


sernám

NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

# Ætlan

Hvat er Autismespektrumsórógv (Tórfríð)

Gentir og dreingir (Tórfríð)

Teoretisk sjónarmið (Liljan)

Autisma í skúlahøpi (Sára)

Vit eru:

Sára P. Rasmussen, sálarfrøðingur (Toymi 3, Tórshavn/Suðuroy)

Liljan Petersen, sálarfrøðingur (Toymi 2, Norður- og Suðurstreymoy)

Tórfríð Arnfríðardóttir Danielsen, sálarfrøðingur (Toymi 4, Eysturoy/Norðoyggjar)

sernám

NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

# Hvør fann uppá autismu?

Heiti autisma var fyrstu ferð brúkt í 1912 av psykiataranum Bleuler.

Griskan uppruna αυτος (*autos*), sum merkir ”sjálv” ella ”í mær sjálvum”.

Diagnosan viðurkend á fyrsta sinni 1940´inum (Leo Kanner og Hans Asperger)

1979 fann Lorna Wing 3 kjarnuøkir:

- Samspæl og sosial sambond
- Samskifti (verbalt og non-verbalt)
- Ímyndingarevni/repetitiv atferðarmynstur

# Vøkstur í títtleika




Kelda: Rice C. Encyclopedia of autism spectrum disorders. Volkmar F, editor. New York: Springer; 2013. pp. 3120–3125. (Time trends in diagnosis).

sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

# Vøkstur í gransking




Kelda: Meng-Chuan, Lombardo, Baron-Cohen (2014). Autism. *The Lancet*

# Hvat er autisma?

Neurobiologiskt

Arvaligt (uml 70% - 90%)

Eitt gjøgnumgrípandi menningarórógv

Lívslangt

Títtleiki world wide: 1-2 %

# Autisma = ein onnur stýrisskipan




Mac Windows

.....t.v.s skilja seg frá okkum neurotypisku

# Okkara fokus



# Wing triadan (1979)
# 3 kardinalsymptomir




*Diagnosusystemini ICD-10 (Europa) og DSM-IV (USA) eru bygt á Wing-triaduna*

*Samspæl og sosial sambond*










*Samskifti (málsliga- og ikki-málsliga)*

sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

• FORESTILLINGSEVNE




*Ímyndingarevni*
*Repetitiv,*
*innskrenkaði ella*
*intens atferðarmynstur*
*“Same-ness”*



# Komorbiditetur



# Onnur eyðkenni - sansir



sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

# “Autismuspektumsórógv” - eitt paraply-hugtak

*“Infantil autisma”:*
Øll 3 kardinalsymptomir tilstaðar aktuelt og áðrenn 3 ára aldur.
Ofta seinkað málmenning.
50-75 % mental retardering.

*“Atypisk autisma”:*
Bert 2 kardinal-symptomir týðilig, og/ella byrja seinni enn 3 ára aldur.
Ofta mental retardering.

*“Asperger syndrom”:*
Eingin seinking í málsligari ella kognitivari menning.
Minst 2 kardinalsymptomir týðulig aktuelt og afturlítandi, men ofta mildari/ørvísi.

*“Gennemgripende udviklingsforstyrrelse, uspecificeret”*
Týðulig autistisk tekin, sum ávirkar funktiónsstøðið, men uppfyllir ikki kriteriuni fyri nøkrum av hinum diagnosunum.

# Autismu*spektrum*

Mental retardering
Lítið mál
Stóran tørv á stuðli alt døgni
Sansasart (ljóð + ljós)
Nógva stereotypa atferð

Høgan IQ
Serlig evnir (talv, rokning)
Klára seg í gerandisdegnum
Passar ikki inn sosialt
Trívist best heima

# Autismuspektrum: eitt heterogent órógv (ymiskir profilar)

*Intelligensur:* Djúp retardering-------------------------------------------------------------------Høgt begávaði

*Sosialt samspæl:* Afturhaldin--------------------------------------------------------------------Uppsøkjandi

*Samskifti:* Uttan mál----------------------------------------------------------------------------Aldursvarandi mál

*Stereotypa atferð:* Nógva--------------------------------------------------------------------- Lítla/onga

*Seráhugamál:* Ongi-----------------------------------------------------------------------------Nógv/intens

*Sansir:* Søkja sansustimuli---------------------------------------------------------------------Víkja sansustimuli

*Motorikkur:* Ókoordineraði---------------------------------------------------------------------Koordineraði

*Megna broytingar:* Væl-----------------------------------------------------------------------Illa

*Uppmerksemi:* Gott---------------------------------------------------------------------------Ringt

*Ótti:* Nógvan-----------------------------------------------------------------------------------Ongan

*Humør:* trist(ur)--------------------------------------------------------------------------------Glað(ur)

# Barn A, barn B, barn C, o.s.fr….

*Intelligensur:* Djúp retardering----Høgt begávaði

*Sosialt samspæl:* Afturhaldin----Uppsøkjandi

*Samskifti:* Uttan mál----Aldursvarandi mál

*Stereotypa atferð:* Nógva---- Lítla/onga

*Seráhugamál:* Ongi----Nógv/intens

*Sansir:* Søkja sansustimuli----Víkja sansustimuli

*Motorikkur:* Ókoordineraði----Koordineraði

*Megna broytingar:* Væl----Illa

*Uppmerksemi:* Gott----Ringt

*Ótti:* Nógvan----Ongan

*Humør:* trist(ur)----Glað(ur)

sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

# Autismuspektrum


























# Heterogent órógv - men kjarnan er niðursett sosialt samspæl

- Trupult at avlesa "social cues", millisekund fyri millisekund.
- At túna inn og tilpassa seg onnur.
- Mugu læra sosialir reglar "akademiskt", har vit onnur læra tað við okkara "magafornemmilsi".



# Gentur og dreingir (1:4)

- Umleið 4 ferð fleiri dreingir verða diagnostiseraðir við autismu enn gentir. Ratio 1:4 (Lancet; 2014)
- Befolkningsundersøgelser vísa 2-3 ferð fleiri dreingir. Kann týða uppá undirdiagnosticering av gentum (Lancet; 2014)
- “High-functioning” gentur verða seinni diagnostiseraðar enn dreingir (Lancet; 2014)



# Tøl frá barna- og ungdómspsykiatriini 2018

| | Gentur | Dreingir | Tils (% av 145): |
|---|---|---|---|
| Infantil autisma | 8 (13,3%) | 52 (86,6%) | 60 (41,4%) |
| Aspergers syndrom | 27 (44,3%) | 34 (55,7%) | 61 (42,0%) |
| Atypiskt/anden gennemgribende mental udviklingsforstyrrelse | 7 (29,2%) | 17 (70,8%) | 24 (16,6%) |

145 børn yngri enn 18 ár eru skrásett við autismuspektrum.
T.e. uml. 1,2% av øllum føroyskum børnum yngri enn 18 ár.

| N=145 | Gentur | Dreingir |
| --- | --- | --- |
| | 42 (29%) | 103 (71%) |
| Aldur diagnostiserað | 12,2 (2,6) | 8,7 (3,4) |

sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

# Hví munur á kynunum?

Gentur: rolluspøl = empathizing
Dreingir: hella til mynstur = systematisering

*Verkfrøðingur/KT fólk vs. Sjúkrarøktarfrøðingur/námsfrøðingur*

**Autisma = ein ekstremur variantur av tí mannliga heilanum (the extreme male brain – hypotesis)**





sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

# Gentur – hví seinni?

“Kamuflageteori”

Kopiera spæl, klædnastíli, kroppsmál, tónalag, áhugamálum og atferð.

Tær kopiera uttan nøktandi forstáðilsi fyri teimum undirliggjandi sosialu mekanismunum.

Sosialt yvirarbeiði.

Gentukulturur vs. dreingjakulturur: seráhugamál ikki avvíkjandi, men meiri intens.

Eru ikki eitt “problem” í barnaárunum.

Diagnosan er grundað á dreingjaeyðkenni.



sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING


"[So-called] Mild autism doesn't mean one experiences autism mildly...
It means YOU experience their autism mildly.
You may not know how hard they've had to work to get to the level they are."
-Adam Walton-


ENERGINIVEAU
NEUROTYPISKE ENERGINIVEAU
AFLADES LANGSOMT
OPLADES HURTIGT
ASF'ERS ENERGINIVEAU
AFLADES HURTIGT
OPLADES LANGSOMT

# Teoretisk sjónarmið

THEORY OF MIND

CENTRAL COHERENCE THEORY (SENTRALUR SAMANHANGUR)

EKSEKUTIVAR FUNKTIÓNIR

# Theory of Mind



# Theory of Mind

Hvat er tað?

Snýr seg um at skilja og at gáa um ætlanir, tankar og kenslur hjá øðrum menniskjum

Mind-read

sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

# Theory of Mind = GPS



sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

# Theory of Mind og Autisma



sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

# Mindblindness ella “Sinnisblindni”




sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING


Sally
Anne
This is Sally's basket.
This is Anne's box.
Sally puts her red ball . . .
into her basket.
Sally goes out of the room and leaves Anne alone.
Anne takes the ball out of the basket . . .
and puts it in the box.
When Sally comes back . . .
she wants to play with the ball.
Where will Sally look for her ball?

# Theory of Mind

Mentalisering

Kanningar hava víst, at tað eru menniskju, ið megna Theory of Mind-testina.

Aldur, IQ og málsligir førleikar hava ein týðandi leiklut, tá ið metast skal um hendan førleikan

Kanningar hava t.d. víst, at nógv menniskju, ið hava Asperger megna testina

# Samanumtikið

Theory of Mind snýr seg um at skilja og at gáa um ætlanir, tankar og kenslur hjá øðrum menniskjum

Vit kunnu ímynda okkum Theory of Mind sum ein GPS

Sally-Anne kanningin vísti á eina avbjóðing í mun til førleikan at skilja, at menniskju hava sinnistøður, ið eru øðrvísi enn eins egnu.

Niðursett evni til mentalisering kunnu viðføra sosialar avbjóðingar

# Central Coherence Theory

TEORIIN UM SENTRALAN SAMANHANG



# Central Coherence Theory

Hvat er tað?

Ein forkláringsmodell

Ein máti at viðgera informatión uppá ella ein stílur

Eitt bias

Tendens til at fokusera á smálutir í staðin fyri heildina ella "Tað stóra bílæti"

# Sentralur Samanhangur

**Veikan**

Fyrimunir:

- Minnist væl til smálutir
- Góð evni til at rættlesa
- Uttanatslæru

Vansar:

- Tekur td. orðatøk bókstaviliga

**Sterkan**

Fyrimunir:

- Góð evni til at samanfata
- Minnast til essensin av td. einari søgu

Vansar:

- Ikki geva sær gætur og um smálutir, ið kunnu vera umráðandi

sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING



# ..tá ið man hevur trupult við at síggja skógin fyri trøum







sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

# Samanumtikið

- Teoriin um veikan sentralan samanhang snýr seg um ein ávísan máta at viðgera informatión
- Kann siga nakað um styrkir hjá menniskjum við autismu
- Er eitt aspekt av autismu

sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

# Eksekutivar funktiónir

sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

# Eksekutivar Funktiónir

Intelligensur er eitt begreb ella ein konstruktión, sum lýsir ymiskir førleikar innan ymisk øki

Tað sama er galdandi fyri eksekutivar funktiónir

Kunnu lýsa førleikarnir hjá einum menniskja við atliti til at loysa uppgávur og at leggja til rættis (selvorganisering)

Tá ið man skal loysa eina uppgávu skal man td. nýta ímyndingarevni, stuttíðarminni, uppmerksemi, motorik osfr.

# Eksekutivar funktiónir

Funktiónur ið eru neyðugar, tá ið man skal:

- Fara í gongd við eitthvørt
- Tá ið man skal loysa eina uppgávu
- Tá ið man skal minnast til og nýta eina vegleiðing
- Tá ið man skal tilrættaleggja
- Tá ið man skal standa ímóti impulsum
- Tá ið man skal eftirmeta arbeiði td. tá ið man skrivar ein stíl
- Vm..

# Eksekutivar funktiónir

- Tá ið man fær sær okkurt at eta
- Tá ið man skal læra at koyra bil
- Tá ið man ger mat eftir einari nýggjari uppskrift

Eksekutivar funktiónir traðka soleiðis í kraft, tá talan er um nýggjar ella kompleksar uppgávur ella avbjóðingar, sum ein ikki fær loyst við at gera "tað vanliga", t.v.s. har man ikki kann koyra uppá rutinuna

Tá ið man so hevur lært t.d. at koyra bil, so loysir tú uppgávuna uttan hóvasták og pláss er til t.d. at lurta eftir einari sending í útvarpinum, ella at taka avgerð um, hvat tú skalt gera til døgurða

# Amboðskassin ⟷ handverkarin



sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

# Eksekutivar Funktiónir

Eksekutivar funktiónir eru ikki viðføddar, men byrja at mennast frá ungum aldri

Tað lítla barnið hevur t.d. lítlan innara struktur, og tí má umhvørvi skapa ein struktur (nær barnið skal sova, eta, spæla osv.)

Tað størra barnið hevur størri innara struktur, og nýtist ikki uttara struktur á sama hátt, sum tað lítla barnið.

Tað størra barnið kann fara í gongd við at rudda kamarið, vitja vinfólk, gera skúlataskuna til reiðar osfr.

Hesir førleikar eru dynamiskir og eru ávirkaðir av m.a. kenslum.

# Eksekutivar funktiónir tengdar at aldri




sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

# Eksekutivar Funktiónir

Kanningar vísa, at menniskju við diagnosum, hava fleiri eksekutivar dysfunktiónir enn fólk uttan diagnosur

Eksekutivar dysfunktiónir er ein sentralur partur av avbjóðingum hjá menniskjum við ADHD

Tað vísir seg at samband ofta er ímillum autismu og veikleikar innanfyri kognitivan fleksibilitet og tilrættalegging, tá ið ræður um eksekutivar dysfunktiónir

# Samanfatan

## Theory of Mind

Hjálp til at skilja sosialar og samskiftisligar avbjóðingar

## Veikur Sentralur Samanhangur

Hjálpir okkum at skilja td. styrkir

## Eksekutivar Funktiónir

Hjálpir okkum at skilja avbjóðingar ma. við handfaring av uppgávum í gerandisdegnum

sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

# Autisma í skúlahøpi



sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

# Hvussu børn við autismu uppliva skúlan

https://www.youtube.com/watch?v=aPknwW8mPAM

sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

# Stuðla barninum í sosialum samanhangum

Hava tørv á hjálp fyri at skilja sosialar reglur

Læra hvat hóskandi atburður er í ymiskum sosialum samanhangum

Stuðla barninum við at handfara óstruktureraðar løtur

Stuðla barninum at luttaka í aktivitetum við øðrum børnum

# Stuðla barninum við samskiftinum

Hugsa um hvussu tú kanst gera samskifti týðiligt

Loyv viðgerðartíð (processeringstíð) – skilja, sodna, geva afturboð

Stuttir setningar kunnu hjálpa

Kanna fatan

Nýt visuel amboð



sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

# Forútsigiligheit og organisering

Hjálp til at fáa yvirblik

Hav rutinur

Fyrireika skiftir/broytingar

Hav eitt væl organiserað umhvørvi

Gev avmarkaðar og greiðar valmøguleikar

Nýt visuel amboð




sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING




# Sansir

# Samanhangur ímillum autismu, stress og belastning

**Autisma**

**Væntandi:**

- **Strukturur**
- **Forútsigiligheit**
- **Visualisering**
- **Meining og motivatión**
- **Sansakompensering/ aktivering**

**Stress**

**kann føra til:**

- **Forvirring**
- **Óró**
- **Nervøsitet**
- **Rigiditet**
- **Verri minni**
- **Niðursett yvirblik, yvirskot og hug**
- **Ávirkan av døgnrytmuni**
- **Broyttan matarlyst**

**Belasting**

**Stress yvir longri tíð kann føra til:**

- **Angist**
- **Depressión**
- **Isolatión**
- **Skúlaaftran**
- **Sjálvskaðandi atferð**
- **Misnýtslu**
- **Kroniska pínu**
- **Sjálvmorðstankar/ roynd**

sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

# Autisma og ótti

Børn við autismu hava oftari ótta, enn børn sum ikki hava autismu

Onkur kanning vísir uml. 45% hava ótta onkuntíð í barndóminum

Ymiskar orsøkir:

- Sansa viðgerð – yvir og undir sensitiv
- Avbjóðingar við sosialum samskifti og samspæli
- Avbjóðingar við at skilja kenslur hjá sær sjálvum og øðrum
- Stúranir í mun til skiftir og tí ókenda
- Presentatións angist



# Ótta reaktiónir: fight flight freeze

# Pathological Demand Avoidance (PDA)

Profilur hjá summum við autismu

Sera krav-avvísandi

Hava sera nógvan ótta og hava stóran tørv á at vera í kontrol

Óttin kemst av:

- Uppfatan av krøvum ella møguligum krøvum
- Stúranir um at miseydnast
- Ikki at vera í kontrol

# Skúlaaftran

Tá eitt barn ikki megnar skúlan

Sosialar avbjóðingar

Børn við autismu vera oftari avvíst, útihýst, og happa av javnaldrum

Sosialar undanførslur verri hjá tannáringum

Ótti, stress og belastningur í umhvørvinum

# Planlegging og eftirmeting

sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING


Kanna tørvin
Legg eina ætlan
Set tiltøk í verk
Eftirmet
Áset næstu stig

# Kanna tørvin

Kortlegg styrkir og økir har barnið hevur tørv á hjálp

Eygleið barnið í tí dagliga

Tosa við foreldur um teirra upplivingar og ynskir

Involvera Sernám o.a. instansir, har tørvur er á tí

Hygg eftir:

- Hvussu samskiftir barnið?
- Hvussu eru sosialu førleikanir?
- Hvussu gongur við tí fakliga og motivatiónini til at læra?
- Hvussu er atferðin í ymskum støðum og kontekstum?

| | |
|---|---|
| Mál og samskifti | Sosialir førleikar og relatiónir |
| Fleksibilitetur í tankagongd og atferð | Sansir og koordinatión |

sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING


Sjálv/ur
Lurta eftir øðrum
Bólka-arbeiði
Myndir, modellir, diagram-ir
Læring
Lærubóki
Skriving
Tosa um ting
Gera ting

# Spyr barnið...

# Legg eina ætlan

Tá man hevur fingið eina mynd av tørvinum, kunnu mál setast

Ger hetta í samstarv við foreldur og onnur sum eru rundanum barnið

Vel nøkur fá mál at arbeiða við

Být málið í smærri bitar

Mál skulu helst vera: ítøkilig, til at máta, realistisk og tíðarásett

sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

| Mál | Stutt-tíðar mál | Átak | Hvør | Eftirmeting |
|---|---|---|---|---|
| **Fáa John at megna at koma í gongd við uppgávur** | John megnar at skipa síni ting til skrivligar uppgávur í Føroyskum | John fær ein lista, sum vísir rutinuna í mun til at taka tingini hjá sær fram | Lærarar/førleikastova | Um 6 vikur |
| **Menna sosialar førleikar hjá John** | John fer at luttaka í einum lítlum bólki við tveimum øðrum næmingum | Skipa bólka aktivtetir sum fokusera uppá okkurt sum John er áhugaður í | Lærarar/førleikastova | Um 6 vikur |

# Set tiltøk í verk

Fyri at interventiónir skulu eydnast eru relatiónir við barnið sera týðandi

Relatiónsarbeiði kann innibera at geva barninum stuttligar aktivitetir og at fylgja áhuganum hjá barninum

Hugsa um samanhangin:

- Nær byrjar man og hvar
- Í hvørjum samanhangi byrjar man, t.d. í einum faki við einum lærara
- Hugsa um samstarvið millum heim og skúla

sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

# Eftirmeting

Hvussu hevur interventiónin riggað?

Hvat hevur ávirkað interventiónina?

Hevur barnið ment førleikar í einum samanhangi, men ikki í einum øðrum?

Minst til: menningin hjá børnum er ikki altíð linjurøtt, og ofta er tørvur á at endurtaka læring

# Áset næstu stig

Er tað nakað man kann gera meir av ella øðrvísi?

sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

# Samanumtikið

Børn við autismu hava tørv á strukturi, forútsigiligheit og stuðli í sosialum samanhangum

Um tey ikki vera rætt møtt, kunnu tey gerast sera belastað og hetta kann hava stórar avleiðingar

Týdningarmikið at hyggja eftir serstaka tørvinum hjá einstaka barninum við autismu



# Takk fyri ☺